

# NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK JULI 2004**


**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00**
**og sunnudagar kl. 14.00-17.00**
**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**


## TILTØK JULI 2004

**Framsýningin „Veiðimentan" er á Etnografisk Museum í Stockholm til 23. september 2004.**

**Framsýningin „Atlantic Visioner" (F) í Mikkelberg, Suðurslesvig endar 04. juli 2004.**

**Summarframsýningin 2004, við átta føroyskum listafólkum, er í húsinum til 30. juli 2004.**

MIKUDAGUR 07. JULI
**Kl. 19.30 Summartónar 2004,**
Konsert Atli Ellendersen, violin (FO) og Sune Brogaard , klaver (DK). Skráin sæst á www.nlh.fo. Atgongumerki á kr. 80.-. eru at fáa í NLH og Kunningarstovuni.í Havn.

LEYGARDAGUR 10. JULI
**Kl. 22.00 Føroysk Dansinátt:**
Fyriskiparar: Sláið Ring og Norðurlandahúsið.
Atgongumerki á 90.- kr. fáast við dyrnar.

Sunnudagur 11. juli
**Kl. 15.00 Gjáarkonsert:**
Wärme Kvartetten (S/DK) í kirkjuni við Gjógv.
Mezzosopran, accordeon, fløjta og cello.

**Kl. 17.00 Gjáarkonsert:**
Wärme Kvartetten (S/DK) í bygdahúsinum við Gjógv.
Mezzosopran, accordeon, fløjta og cello.

SUNNUDAGUR 18. JULI
**Kl. 16.00 Fólkatónleikarastevnan 2004**
Markamot (FO) við Janus Trúgvason, Eyðun Hansen, Finnur Hansen, Arnold Ludvig. Angelika Nielsen (FO), Gemma Donald (Het), Heðin Z. Davidsen við Mikal Blak og Høgna Lisberg.
Atgongumerki á kr. 125 eru at fáa í NLH og Kunningarstovuni í Havn.

Sunnudagur 25. juli
**Kl. 16.00 Konsert við Sigrið Rasmussen og Gunnar Guttesen**
Atgongumerki á kr. 100 eru at fáa í NLH og Kunningarstovuni í Havn.

MIKUDAGUR 28. JULI
**Ólavsøkuaftan, húsið er opið frá 14.00-20.00**

HÓSDAGUR 29. JULI
**Ólavsøkudagur, húsið er opið frá 14.00-20.00**

FRÍGGJADAGUR 30. JULI
**Húsið er opið frá 14.00-18.00**

**Broytingar kunnu koma fyri!**

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00**


**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo e-mail: nlh@nlh.fo**


## HEIMSKENDUR RITHØVUNDUR Á LISTASTEVNUNI

**Listastevnan:** Jostein Gaarder hevur skrivað heimskendu skaldsøguna „Sofies verden". Í august kann hann upplivast í Norðurlandahúsinum

Tað varð nógv gjørt burturúr og eydnaðist væl, tá ið Fay Weldon vitjaði í Føroyum í fjør. Aftur í ár hevur eydnast Listastevnuni at fáa ein heimskendan høvund at práta, lesa upp og greiða frá sínum skaldskapi.

Jostein Gaarder breyt av álvara ígjøgnum skaldsliga ljóðmúrin, tá ið hann í 1991 hevði skrivað og útgivið skaldsøguna „Sofies Verden". Hann væntaði ikki stórvegis hóvasták av bókini sjálvur, tí hann helt, at bara ein serligur lesaraskari fór at geva heimspekiliga innihaldinum gætur.

Hann fór skeivur. Í 1995 var „Sofies verden" mest selda skaldsøgan í heiminum. Higartil eru hon týdd til 49 mál og seld í meira enn 25 milliónum eintøkum, og haraftrat er søgan gjørd til film.

Á sjálvari Listastevnuni tann 6. august kemur bókin út á tí 50. málinum: Føroyskum! Edvard Olsen hevur týtt, og tað er Bókadeild Føroya Lærarafelags, ið gevur út. Sama dag kemur ungdómsbókin „Appelsingentan" eftir sama høvund út, sum Laura Joensen hevur týtt. Bókadeildin hevur áður útgivið bøkurnar „Jólagátan", „Kabalgátan" og „Sum í spegli, sum í gátu".

Tiltakið við Jostein Gaarder verður skipað á sama hátt sum við Fay Weldon. Hann lesur upp úr egnum verkum, og Laura Joensen lesur upp úr síni egnu týðing. Ivan Niclasen verður vertur og setir spurningar, og høvið verður eisini hjá áhoyrarum at spyrja um alt millum himmal og jørð. Tað munnu nógv, sum hava lisið „Sofies verden", hava hug til, tí bókin er sera hugvekjandi.




Jostein Gaarder verður bólkaður millum barna- og ungdómsrithøvundar, men hann røkkur nógv longri enn til hendan avmarkaða málbólk. Hann varð føddur í Oslo tann 8. august 1952, og longu sum smádrongur var hann hugtikin av heimspeiki, og tað sæst aftur í hansara bókum. Honum dámdi at seta spurningar, sum ongin dugdi at svara, og í heiminum varð tosað um heimspeki, politikk, trúgv og mentan. Eisini gjøgnum ungdómárini upptóku teir stóru spurningarnir um lívið og deyðan hann, men tað órógvaði hann ikki, at hann einki endaligt svar fekk.

Fyri Jostein Gaarder var meiri umráðandi at finna spurningar enn svar, og tað gjørdi hann til heimspeking ella teinkjara. Hann gjørdist lærari í heimspeki, men setti sær seinni fyri at skriva burturav, og tað gjørdist hann víðagitin fyri.

Á sínum egna føðingardegi, tann 8. august, kann hann upplivast í Norðurlandahúsinum.

## LISTASTEVNAN VÆL STUÐLAÐ

Arbeiðið við Listastevnuni 2004 gongur væl. Listastevnan takkar fyritøkum, stuðlum og listastevnuvinum, ið borga fyri høgum listarligum upplivingum

„Listastevnan fegnast um ta stóru undirtøku, sum hon hevur fingið frá borgarum landsins.

Hetta størsta mentanartiltak her á landi hevur fingið dyggan stuðul frá fyritøkum, stovnum, listastevnuvinum og samstarvsfeløgum, sum sostatt eru við til at geva okkum føroyingum listarligar upplivingar á høgum støði," sigur samskipari á Listastevnuni, Oddvá Nattestad, sum hevur úr at gera við at fyrireika Listastevnuna mest sum alt árið.

Listastevnan hevur verið við til at lyft føroyska mentan, síðan hon kom, men uttan góðar stuðlar hevði tað ikki borið til, sigur Oddvá Nattestad.

Listastevnan vil fegin takka **Føroya Sparikassa fyri at vera høvuðsstuðul til Listastevnu Føroya 2004.** Listastevnan takkar **Flogfelag Føroya, Atlantic Airways, Hotel Føroyum, Dimmalætting, Tórshavnar Býráð og Mentanargrunninum. Og Listastevnuvinunum 2004: Føroya Lívstrygging, Føroya Tele, Kaupting Føroyar, Postverk Føroya, MBM, SEV, Sirri P/f, SMS P/f, Tryggingarfelagið Føroyar.**



## FUGLFIRÐINGUR Í BRASILIA SPÆLIR SUMMARTÓNAR

**Summartónar:** Fuglfirðingurin Atli Ellendersen kemur heilt út Brasilia at framføra Summartónar saman við danan um Sune Vejlby Brogård. Teir framføra bæði føroysk og útlendsk verk, og ein forkunnug frumframførsla er eisini á skránni.

Summartónar 2004 fóru av bakkastokki 19. juni og hildið verður fram til 11. juli. Spældur verður klassiskur og nýtímans tónleikur, har síður er, at føroyskir tónasmiðir fáa síni verk framførd av dugnaligum tónleikarum hiðani og uttan úr heimi.

Konsertin hjá Atla Ellendersen og Sune Vejlby Brogård 7. juli er ein partur av Summartónum 2004. Teir spæla fleiri føroysk verk á konsertini, eitt nú eina frumframførslu av einum verki eftir Edvard Nyholm Debes.

Verkið, sum kallast „Trees and Birds", er skrivað í 2004. Edvard Nyholm Debes er úr Havn og er kendur sum bassistur í nógvum ymiskum høpi. Hann hevur eitt nú spælt og útgivið bæði jazz og blues, men haraftrat spælir hann kontrabass í Føroya symfoniorkestri.

Á konsertini hjá Atla og Sune eru eisini verk eftir Kára Bæk og Sunleif Rasmussen. Kári skrivaði „Afturundirgerð" fyri soloviolin í 1998, og Sunleif gjørdi „Echoes of the Past" fyri soloviolin í 1992. Annars er eisini tónleikur eftir M. Camargo Guarnieri (1907-1993), Sergei Prokoviev (1981-1953) og César Franck (1822-1890) á skránni, ið geva Atla Ellendersen og Sune Vejlby Brogård høvi at vísa síni kynstur á ávikavist violin og klaver.

Atli Ellendersen er úr Fuglafirði. Fyrstu fiólítímarnar fekk hann frá Alexi Sólstein, og hann helt fram við síni tónleikaútbúgving í Danmark hjá violinistinum Arne Svendsen. Síðan fór Atli á Universitetið í Keypmannahavn, har Nina Gade tók sær av honum, og seinni gekk leiðin til Sveis, har hann fekk undirvísing hjá Max Rostal. Nógv góð fólk hava sostatt givið honum gott í beinið.
Atli Ellendersen hevur búð í Brasilia síðan 1989, har hann hevur spælt saman við Blumenau Kamarorkestrinum, og Aurcaria Kvartettini. Hann hevur stjórnað og verið konsertmeistari og verið listarligur leiðari hjá Curitiba Kamarorkestrinum.

Sune Vejlby Brogård er úr Birkerød í Danmark. Hann er útbúgvin á Kongaliga Danska Musikkonservartoriinum, har hann lærdi hjá Frederich Gurtler, Stanislav Knor og Amalie Maling. Hann hevur eisini gingið til master class hjá Robert Riefling, Conrad Hansen og Tatiana Nikolayeva.

Atli Ellendersen og Sune Vejlby Brogård hava fleiri ferðir áður framført saman í Føroyum. Konsertin verður í Høllini í Norðurlandahúsinum 7. juli 2004 kl. 19.30, og kostnaðurin er 80 krónur.

## SIGRIÐ OG GUNNAR AFTUR Í HÚSINUM



**Gospel:** Áskoðararnir á konsertini hjá Sigrið Rasmussen og Gunnar Guttesen 25. juli, kunnu vænta sær eitt bland av jazz, gospel og poppi

Sigrið Rasmussen man vera ein av okkara allar frægastu gospelsangarum og hevur áður drigið stóra fjøld til sín, tá ið hon hevur havt konsertir í Føroyum.

Sunnudagin 25. juli hevur hon konsert saman við komponistinum, sangaranum og klaverleikaranum Gunnar Guttesen í Norðurlandahúsinum, og lítil ivi er um, at hendan konsertin beint upp undir ólavsøkuna man vera eitt av mongu musikalsku hæddarpunktunum í summar.

Tey bæði hava roynt seg í Føroyum og uttanlands síðstu árini, og størstu umrøðuna hevur Sigrid Rasmussen fingið fyri sín leiklut í norska gospelbólkinum Grace, sum gjørdi nógv um seg til hann gavst í 2000. Sigrið hevur annars eisini verið við í gospelkórinum „Romerikes Gospel Kor", sum nú kallast Norwegian Gospel Voices, har hon var ein av høvuðssolistunum 1995-2002.

Sigrið Rasmussen hevur annars lært at spæla og spælir violin. Nú býr hon í London, har hon gongur á universitetinum og kann um eitt ár skriva „BA Degree in Popular Music and Performance" á sítt visittkort.

Musikalskt rann saman millum Gunnar og Sigrið í føroyska gospelkórinum United Voices. Gunnar Guttesen var millum annað konsertferð við United Voices í 2001, har tey framførdu bæði Tivoli og Musikhuset í Århus. Nú er Gunnar orkesturleiðari.

Sigrið og Gunnar hava áður havt konsert saman í Norðurlandahúsinum í 2001, og ta ferðina vórðu tey størliga fagnað av trúgvu gospeláhoyrarunum. Enn er skráin ikki løgd fyri hesa summarkonsertina, men tey bæði siga, at tað verður eitt bland millum jazz, gospel og popp, ið verður einfalt skipað fyri klaver og sang.

Sigrið Rasmussen og Gunnar Guttesen syngja og spæla 25. juli í Norðurlandahúsinum.

Atgongumerkini fáast í Kunningarstovuni og í Húsinum.

## FÓLKATÓNLEIKARASTEVNA

Síðstu árini hevur Fólkatónleikarastevnan ligið saman við G!-festivalini, og í ár verður einki undantak. Konsertin í Norðurlandahúsinum verður tann 18. juli, dagin eftir rokið á Gøtusandi.

Konsertin, sum er sunnudag klokkan 16, fevnir um fleiri áhugaverd føroysk og útlendsk nøvn. Føroysku luttakararnir verða Angelika, Markamót og HZD. Úr Hetlandi koma Gemma & Isobel, og Malang Trio kemur úr Finnlandi og Senegal.

## FØROYSK DANSINÁTT FYRI 14. FERÐ

**Dansinátt:** Fjúrtanda árið á rað skipa Sláið Ring og Norðurlandahúsið fyri dansinátt

Leygarkvøldið 10. juli klokkan tíggju verður farið upp á gólv í Norðurlandahúsinum, og dansað verður í minsta lagi til klokkan tvey um náttina. Er dansurin góður verður hildið á til klokkan trý, lova fyrireikararnir.

Tað var helst við útlendskum ferðafólki og útisetum í summarfrí í huga, at Norðurlandahúsið og Sláið Ring í 1990 tóku stig til at hava eina dansinátt í Norðurlandahúsinum í juli mánaði. Alt vetrarhálvárið høvdu dansifeløgini dans á skránni, meðan lítil og eingin dansur var um summarið.

Og tikið varð væl ímóti tiltakinum. Serliga fyrstu árini varð væl vitjað, og seinnu árini hava hópin av útlendingum verið við. Dansurin hevur øll árini verið á einari góðari leið, og fyrireikararnir vóna, at nógv dansihugað fara at møta í ár.

**Dansináttin verður 10. juli, og atgongumerkið kostar 90 krónur.**

## TVÆR KONSERTIR -TVÆR FRUMFRAMFØRSLUR

**Gjáarkonsert:** Tróndur Bogason og Kristian Blak fáa hvør sítt verk frumframført, tá ið Wärme Kvartetten heldur konsert í Gjógv sunnudagin 11. juli sum lut í ársins Summartónum

Svenska-danska Wärme Kvartetten fer at hava konsert bæði í kirkjuni og í bygdarhúsinum við Gjógv hendan sunnudagin í juli, og tað verður eitt serligt upplivilsi, sum tey, ið møta, fara at fáa.

Wärme Kvartetten varð stovnað í 1994 við tí fyri eyga at festa núlivandi kvinnulig tónaskald úr Norðurlondum á fløgu. Gjøgnum árini hevur bólkurin umboðað nýggjan norðurlendskan kamartónleik á nógvum konsertum innan- og uttanlanda.

Óvanliga samansetingin á bólkinum hevur givið mongum tónaskøldum íblástur til at royna nógvu møguleikarnar at bera fram tónleikin. Eva Bruun Hansen er mezzosopran, Lena Bust Nielsen spælir floytu, Marie Wärme spælir accordeon (harmoniku) og Anne Hall spælir cello.

Í kirkjuni fer Wärme Kvartetten at frumframføra „Stone Forest" eftir Kristian Blak, og í bygdarhúsinum tveir tímar seinni verður verkið „Wer herrscht" eftir Trónd Bogason frumframført.

Harumframt verður tónleikur við bæði japonskum og norðurlendskum íblástri spældur, har sangari og tónleikarar skiftast um at vera solistar.

Konsertin í kirkjuni við Gjógv verður sunnudagin 11. juli klokkan 15.00 og í bygdarhúsinum klokkan 17.00.